VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og ælingur, partvís vátaslettingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.



Veðrið hósdagin:
Fyrrapartin stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í skrið ella storm og um kvøldið regn. Hitin kemur upp í 7 til 10 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Fyrrapartin upp í skrið av landnyrðingi og regn. Seinnapartin minni vindur av eystri og yvirhøvur turt. Hitin millum 8 og 11 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi og eystri, eitt skifti minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 8 og 12 stig.

Skelkaður danskur flogskipari

Danski flogskiparin í flogvanlukkuni er komin aftur til Keypmannahavnar, og skal hava sálarfrøðiliga hjálp, fyri at koma fyri seg aftur

FLOGVANLUKKA
Rólant Waag Dam
rolant@sosialurin.fo

Leygardagin varð danski flogskiparin í flogfarinum hjá Atlantsflog útskrivaður av Stavanger Universitetssjúkrahúsi. Danska Ekstra Blaðið royndi at fáa samband við hann, men flogskiparin, Jakob Evald, vildi onki siga, og í staðin tosaði blaðið so við damuna, sum fylgdi Jakob Evald frá sjúkrahúsinum og til flogvøllin.

Hon greiddi Ekstra Blaðnum frá, at Jakob Evald ikki ynskti at tosa við nakran.

Uttan fyri sjúkrahúsið verður Jakob Evald hjálptur inn í ein hýruvogn, sum koyrir flogskiparan frá sjúkrahúsinum og út á flogvøllin.

Ekstra Blaðið hevur eisini skift orð við marknaðarleiðaran hjá Atlantsflog um flogskiparan.

– Eg havi tosað við foreldrini hjá Jakob, og tey hava greitt mær frá, at hann framvegis er ógvusliga skelkaður eftir vanlukkuna. Eisini hevur hann fingið ein brest í ryggin, og tað skal hann eisini viðgerast fyri, sigur Kent Christensen sambært Ekstra Blaðnum.

Dansa blaðið veit eisini at siga, at tað stendur 39 ára gamla flogskiparanum í boðið at fáa sálarfrøðiliga hjálp, sum jú er neyðug, um hann ætlar at koma fyri seg eftir skelkandi hendingina.

Ekstra Blaðið spurdi eisini Kent Christensen, um Jakob Evald hevði fingið munnkurv, síðani hann ikki vildi tosað við blaðið, men hetta fekk marknaðarleiðarin hjá Atlantsflog ikki svara uppá.

– Eg kann einans siga, at um hann spurdi okkum um hann skal úttala seg til fjølmiðlarnar, so høvdu vit frárátt honum tað inntil skaðanevndin var liðug við sítt arbeiði og er komin við eini frágreiðing.

At enda spurdi danska blaðið, nær Kent Christensen roknaði við, at flogskiparin var klárur aftur at flúgva. Kent Christensen svaraði og greiddi frá, at tað var ógvuliga trupult at siga, men tá hann er klárur fysiskt skal hann ígjøgnum eina heilsukanning, sum skal tryggja, at flogskiparin eisini er komin fyri seg sálarliga, sigur Kent Christensen, sambært danska Ekstra Blaðnum.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	--
Nuuk	2
Qaqortoq	--
Ammassalik	0
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	8
Seyðisfjørður	6
Tórshavn	10
Lerwick	12
Aberdeen	16
London	17
Tromsø	--
Bergen	12
Oslo	--
Stokkhólm	15
Keypmannah.	16
Helsinki	11
Moskva	11
Berlin	16
Warzawa	15
Kiev	10
Bukarest	15
Paris	17
Madrid	25
Róm	24
Malorca	25
Athen	--
Malta	23
Tunis	25
Beijing	17
New Dehli	33
Bangkok	30
Jakarta	33
Sydney	15
New York	20
Miami	30
Los Angeles	20
Meksikobýur	--
Panama	--
La Paz	--
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	26

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt hátrýst, 1037 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum stendur mestsum í stað. Ein kuldabrúgv við Føroyar fer spakuliga suðureftir.



Í dag:
Millum hátrýstið yvir Grønlandsfjørðinum og lágtrýstið við Írland rekur fyribils køld luft av landnyrðingi móti Føroyum.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 8/10 kl. 06^{00}– 9/10. 06^{00}. Hitin í gjár: 10,9°
Minsti hiti máldur í oktober: - -4,0° - Mesti hiti máldur í oktober: 18,4°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 8/10 kl. 06^{00}– 9/10 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í oktober: 0,0 mm

VESTFALLSKYRRINDI

14. oktober	Seinna kvarter
19. oktober	Mánin longst frá jørðini
22. oktober	Tendring

Kelda: Almanakkin 2006

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
17. Okt	04.16	16.37	03.16	15.37	03.31	15.52	06.16	18.37	07.16	19.37	02.31	14.52	01.31	13.52	04.31	16.52	05.31	17.52	04.01	16.22	05.16	17.37
18. Okt	04.56	17.15	03.56	16.15	04.11	16.30	06.56	19.15	07.56	20.15	03.11	15.30	02.11	14.30	05.11	17.30	06.11	18.30	04.41	17.00	05.56	18.15
19. Okt	05.33	17.52	04.33	16.52	04.48	17.07	07.33	19.52	08.33	20.52	03.48	16.07	02.48	15.07	05.48	18.07	06.48	19.07	05.18	17.37	06.33	18.52
20. Okt	06.08	18.25	05.08	17.25	05.23	17.40	08.08	20.25	09.08	21.25	04.23	16.40	03.23	15.40	06.23	18.40	07.23	19.40	05.53	18.10	07.08	19.25
21. Okt	06.42	19.00	05.42	18.00	05.57	18.15	08.42	21.00	09.42	22.00	04.57	17.15	03.57	16.15	06.57	19.15	07.57	20.15	06.27	18.45	07.42	20.00

Sosialurin

GEVID BLÓD

5 707265 100036 >